## Cole skaddur

Hvør smálutur telur, nú Chelsea og Manchester United fyrireika seg til Champions League-finaluna í kvøld. Tí kom tað illa við, tá Ashely Cole small í svørðin eftir nærdyst við Claude Makelele í gjárkvøldið. Eftir at fóturin varð pjøssaður saman, royndi Cole at halda fram við venjingini, men hetta var nyttuleyst, og tí fór hann í skiftirúmið nakað væl undan liðfeløgunum. Enn er ikki greitt, um Cole verður tøkur til dystin í kvøld.



## Chelsea vil meira

Petr Cech, málverjin hjá Chelsea, sigur undan finaluni í kvøld, at Chelsea er svangari enn Manchester United undan dystinum. – Eg veit væl, at fólk siga, at tað er ein fyrimunur fyri sjálvsálitið hjá teimum, at teir longu hava vunnið nakað. Hinvegin kann tað eisini gera, at teir eru róligari undan dystinum, tí teir vita, at nakað longu hevur eydnast. Og tað kann verða ein fyrimunur hjá okkum, sigur Cech. Hinvegin leggur hann dent á, at talan uttan iva verður um sera tætta uppgerð millum tey bæði liðini.




*Vinnandi liðið úr havnini: Helgi D. Ziska, Martin Poulsen, Herluf Hansen, Andrias Ziska, Hjalti T. Jógvansson, Jógvan Joensen*

# Havnin steypavinnari í talvi 2008

**Steypakappingin í talvi varð telvað í vikuskiftinum, og eisini var ymiskt annað á skránni, tá talvgalla var seinni um kvøldið**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*

Steypakappingin í talvi varð fyri fyrstu ferð telvað í fjør, tá Klaksvíkar Talvfelag vann kappingina. Í ár varð telvað eftir sama leisti, har tíggju lið høvdu teknað seg til kappingina. Telvað varð á seks borðum í hvørjum dysti, við 15 min. umhugsunartíð til hvønn telvara.

### Endaliga støðan

| Felag | Stig |
|---|---|
| Havnin | 44,0 |
| Klaksvík | 43,5 |
| Vestmanna | 39,5 |
| Sandavágur | 36,0 |
| Toftir | 26,0 |
| Havnin 2 | 20,0 |
| Klaksvík 2 | 19,0 |
| Rókur | 19,0 |
| Vestmanna 2 | 14,5 |
| Sandavágur 2 | 7,5 |

### Havnin tók øll á bóli

Tað er eingin loyna, at flestu høvdu rokna við, at kappingin fór at standa millum Vestmanna og Klaksvíkina, av tí at Havnin ongantíð kom heilt inn í hitan í liðkappingini.

Munurin á Havnaliðinum í steypakappingini og liðkappingini var, at Helgi D. Ziska og Martin Poulsen høvdu býtt um pláss soleiðis, at Helgi sat á fyrsta borði, og Martin sat á øðrum borði. Helgi D. Ziska fekk 8½ av 9 stigum, meðan Martin Poulsen 9 av 9.

Bæði Havnin og Vestmanna løgdu øgiliga hart út við at vinna fleiri 6-0 sigrar. Her drógu tey bæði liðini veruliga frá klaksvíkingum, sum høvdu eina heldur slakari byrjan.

Vestmanna fekk eitt veruligt skot fyri bógvin, tá teir taptu 4-2 móti Sandavági í sætta umfari. Klaksvíkingar vunnu 6-0 á Sandavági í sjeynda umfari, og gjørdi hetta, at Klaksvíkingar lógu eitt stig frammanfyri Havnina áðrenn seinasta umfar.

Klaksvíkingar møttu tó fyrsta liði hjá vestmenningum í seinasta umfari, har Havnin møtti øðrum liði hjá vestmenningum.

Klaksvíkingar megnaðu at vinna vestmenningar 3½ - 2½, men Havnin vann sín dyst 5 – 1 og fekk harvið snikt seg eitt ½ stig fram um klaksvíkingar. Sostatt gjørdist Havnin steypavinnarar 2008.

### Helgi aftur ársins telvari

Seinni um kvøldið varð talvárið endað við einum gallakvøldi, har telvarir skuldu heiðrast. Millum annað skuldi veljast ársins telvari. Her vóru tríggir telvarir frammanundan valdir út, har møguligt var at atkvøða, hvør av hesum skuldi fáa heitið. Teir í vóru í uppskoti vóru: Helgi D. Ziska, Heini Olsen og Olaf Berg, sum gjørdist Grand Prix vinnari.

Heini hevur vunnið sær ein IM norm, og hevur tí givið Helga harða kapping, men Helgi hevur eisini havt eitt framúr kappingarár, og var eisini favorittur hjá fjøldini.

### Herborg ársins stjørnuskot

Ársins stjørnuskot var valt eftir sama leisti, sum ársins telvari, og her vóru trý í uppskoti: Rógvi E. Nielsen, Herborg Hansen og Sára T. Olsen.

Rógvi hevur víst góðar dygdir við at vinna 1. bólk í FM fyri einstaklingar, meðan Heroborg og Sára vunnu báðar eitt bronsumerkið í NM fyri gentur. Tað er óivað serliga tað, at Herborg gjørdist tann fyrsti kvinnuligi vinnarin av FM fyri unglingar, ið hevur givið henni flest atkvøður.

### Gutti heiðurslimur

Tað er ikki ofta, at Talvsambandið velur at luta út hendan heiður. Tað eru fáir, ið hava fingið hendan heiðurin áður, ið bert verður givið fyri drúgva tænastu fyri føroyska telving. Teir, ið áður hava fingið hendan heiður eru: Hans Petersen, Jákup Thomsen, Niels O. Durhuus, Heri Thomsen, Justinus Hansen.

Gutti varð heiðrarur fyri sín leiklut sum formaður í Talvsambandi Føroya, Sandavágs Talvfelag og og alt annað, hann hevur gjørt fyri føroyska telving.

### Vakrasta talv á fjórða sinni

Ein dómsnevnd hevur mett um talvini í FM fyri einstaklingar, har veljast skuldi vakrasta talvið, ið telvað varð í FM. Hendan heiður hava Rani Nolsøe og Ólavur Simonsen vunnið oftast, ið er tríggjar ferðir í part. Ólavur megnaði í ár at slíta seg leysan frá Rana við talvinum, ið hann vann á Martini Poulsen, og situr nú einsamallur á tí metinum.

## Taptu uppá hornaspørk

**ÍF Føroyar tapti, tá teir fyri sættu ferð í ár fóru á vøllin. Liðið hevur sostatt tapt tríggjar og vunnið tríggjar dystir**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

ÍF Føroyar spældi sín sætta dyst leygardagin. Hesaferð taptu føroysku leikararnir fyri BK Fix. Úrslitið gjørdist 3-1 til gestirnar. Merkisvert var, at øll trý málini fullu eftir hornaspark. Tað fyrsta varð heilfluktað í kassan, meðan tey tey bæði vórðu stútað í netið. Hálvleiksstøðan var 1-0 til BK Fix, og stutt eftir hálvleik øktu teir. Men tá slakur hálvur tími restaði minkaði innskifti Henry Petersen um munin, og brádliga hómaðu leikararnir møguleika at fáa stig úr dystinum. Men henda vón kveiktist skjótt, tí fáar minuttir eftir føroyska málið, hevði BK Fix aftur økt um leiðsluna. Dagsins leikari hjá ÍF Føroyum var annars Regin Petersen, sum arbeiddi væl úti í vinstra borði allan dystin.

Í morgin, hósdagin 22. mai, fara føroysku leikararnir aftur á vøllin. Mótstøðuliðið tá er ØKF, sum eisini hevur heimavøll á Kløvermarkini á Amager. ØKF hevur spælt sjey dystir, altso ein meir enn ÍF Føroyar, hevur 12 stig og liggur í løtuni á einum sætta plássi í deildini. ÍF Føroyar hevur níggju stig fyri seks dystir, sum røkkur til eitt 9. pláss. Fremstir eru KFUM, BK Fix og BK Victoria, sum øll hava 16 stig.